


*Jaspur Johannesen hevur verið handilsmaður alt sítt lív, og eigur nú tríggjar Inn-handlar og skjótt eisini tveir X-tra handlar*

# Inn er in millum fólk

**Tað var eitt sindur av tilvild, at Jaspur Johannesen valdi at byggja sín fyrsta Inn handil við Norðskála, men tað hevur ført til tríggjar nýggjar handlar, ein í Klaksvík og tveir í Havn. – Vit ætla okkum ikki at steðga upp, men vit hava ongar ítøkiligar ætlanir í løtuni, sigur Jaspur Johannesen, sum skjótt hevur 30 ár á baki innan handilslívið**

HANDILSLÍV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Jaspur Johannesen hevur verið handilsmaður alt sítt lív.

– Eg byrjaði sum lærlingur niðri í Ítróttahandlinum hjá Thomas Dam í 1980 sum 19 ára gamal, har eg seldi súklur og fiskiútgerð, sigur Jaspur Johannesen.

Eftir lokna útbúgving á handilsskúla var hann so eitt tíðarskeið í Skemmuni, har hann starvaðist sum leiðari, áðrenn leiðin gekk um Kvettið og Bónus til Inn-handilin við Norðskála.

Handilin lat upp í mars 2002 eftir at hava staðið í ger í hálvt ár, og tað var eitt sindur av tilvild, at fyrsti Inn handilin kolm at liggja við Norðskála.

– Eg hevði hug at byggja mín egna handil, og leitaði eftir rætta staðnum at byrja í. Ein dagin vóru eg og konan farin ein biltúr og koyrdu framvið Eydnuni á Oyrabakka, og tá helt hon hetta staðið vera eitt gott stað at seta ein handil á stovn í. Tann tankin var annars ikki fallin mær inn, sigur Jaspur Johannesen.

Hann kannaði hetta so nærri og tað vísti seg, at grundstykki var tøkt.

– Upplandið er eisini rættiliga stórt og her búgva nógv fólk, so tað gekk ikki long tíð áðrenn eg hevði søkt um grundstykki og byggingin fór í gongd, sigur Jaspur Johannesen.

Hann sigur, at tað var eitt sindur av tilvild, men at tað hevur eydnast væl við handlinum.

Eisini tað, at hann fór undir ein matvøruhandil var eitt sindur av tilvild, men hann starvaðist í teirri bransjuni framman undan, og tí var tað heldur ikki so undarligt, at hann valdi sum hann valdi.

– Handilslívið er eitt ógvuliga hektiskt lív, har eingin dagur er líka. Tað er einki, sum eitur sesong, har er altíð full ferð á. So um tú trívist í tí, er tað ógvuliga torført at sleppa, sigur Jaspur Johannesen.

## Fleiri handlar

Fólk hava tikið væl ímóti handlinum við Norðskála.

– Vit hava verið ógvuliga væl móttikin, og tað hevur fungerað væl. Tað er hesin handilin, sum er grundarlagið fyri tí víðari virksemi, vit hava havt. Og tað er gjarna soleiðis, at gera vit eitt gott arbeiði, verða vit væl móttikin, sigur Jaspur Johannesen.

Hann sigur, at er kundin nøgdur, koyrir alt av sær sjálvum. Og tað má sigast at hava koyrt væl hjá Inn.

– Eg havi ein samstarvspartnara í Klaksvík, og har hava vit so ein Inn-handil eisini. Hesin er hin største hjá okkum, og hinir báðir eru so í Havn, annar á Sundsvegnum og hin á Landavegnum, sigur Jaspur Johannesen.

Tað hevur gingið rættiliga skjótt hjá honum, og tríggir Inn-handlar eru komnir, síðani tann fyrsti læt upp við Norðskála í 2002.

– Beint í løtuni hava vit ongar ætlanir um at víðka um virksemið, og tað eru kanska heldur ikki røttu tíðirnar at hugsa um nýgerð, sigur Jaspur Johannesen.

Tá møguleikarnir tóku seg upp í Klaksvík, var tað í samstarvi við ein verandi handil.

– Talan var um ein gamlan vælriknan handil, sum vit keyptu okkum inn í. Síðani bygdu vit ein bygning við síðuna av hesum, so talan nú er um okkara største handil, sigur Jaspur Johannesen.

Seinni eru so tveir nýggir handlar lætnir upp í Havn.

– Annar teirra er gamli handilin Hjá Eli á Landavegnum, sum var tann fyrri í Havn, og hin er so latin upp í apríl í fjør við Sundsvegin, sigur Jaspur Johannesen.

## 100 fólk í arbeiði

Keypsmynstrið í Føroyum er ógvuliga nógv broytt seinastu 20-30 árini frá gomlu traditionellu handlunum, har ein diskur var millum kundan og handilsmannin, til stóran sjálvtøkuhandlar.

– Úrvalið err vorðið so ógvuliga nógv størri enn tað var. Størri úrvalið er, fleiri kundar krevjast til einstaka handilin, og tað sigur seg sjálvt, at tá úrvalið verður størri og størri og krøvini vaksa, so gerast handlarnir færri og færri. Tað er ein ávísur automatikkur í tí, og so mugu vit bara fylgja við, sigur Jaspur Johannesen.

Hann sigur, at tað merkist, at fólk eru meiri varin í sínum innkeypi.

– Nú eru vit í tí hepnu støðu, at fólk skulu eta hvønn dag, men vit síggja